| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 01. desember 2011 |
| Býráðsfundur nr. | 12/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2011 tann 01. desember kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 25. november 2011 um innkalling til fundar. Talan er um útsetta býráðsfundin frá 24. november 2011.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Gudny Vang
Elisabeth D. Eidevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 47/2011 og 48/2011 vórðu til viðgerðar og avgerðir tiknar.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 47/2011.**

**2. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2012**

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 09. september 2011 til fyribils fíggjarætlan fyri kommununa fyri ár 2012.

Vísandi til grein 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 1. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 25. november 2011 viðgjørt uppskot til 2. og endaligu viðgerð í býráðnum 01. desember 2011, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna hjálagda uppskot til fíggjarætlan kommununar fyri 2012.

Nevnast skal, at viðgerð hevur verið í nevndini tann 23. september 2011 í sambandi við uppskoti til 1. viðgerð (karmar) og á býráðsfundi tann 29. september. Eftir býráðsfundin hava nevndirnar viðgjørt uppskot til fíggjarætlan fyri teirra øki, bæði viðvíkjandi rakstri og íløgum, somuleiðis sum fundir hava verið hildnir í fíggjarnevndini 11., 14. og 15. november 2011.

Haraftrat hava temadagur (arbeiðsfundur) verið hildin millum alt býráðið tann 22. november 2011, somuleiðis sum víðari viðgerðir aftur hava verið á fundi í fíggjarnevndini tann 24. og og 25. november 2011.

Rakstrarútreiðslurnar netto verða mettar brutto til kr. 47.860.200,00, netto til kr. 34.261.200,00, rentuútreiðslur og rentustuðul til kr. 3.970.000,00, avdráttirnir av føstum lánum til kr. 4.000.000,00 og íløgurnar brutto til kr. 16.587.000,00 og netto til kr. 15.187.000,00.

Grundað á at ikki øll eykajáttanin til havnabygging í 2011 upp á kr. 5.200.000,00 ikki verður nýtt, so verður metta ónýtta játtanin upp á kr. 1,7 mió. fyri 2011 flutt til 2012 og fíggjað av innistandandi peningi, hetta sambært góðkenning býráðsins frá 24. juni og 27. oktober 2011.

Nýtslan í ár verður mett til kr. 2,6 mió av fystu eykajáttanini upp á kr. 3,0 mió. + kr. 900.000,00 av seinnu eykajáttanini upp á kr. 2,2 mió. ella tilsamans kr. 3,5 mió. Tessvegna verður ónýtta játtanin í 2011 sum lýst omanfyri upp á kr. 1,7 flutt til fíggjarárið 2012.

*Talan verður um hesar íløgur brutto:*

Øki 2. Almanna og heilsumál kr. 300.000,00

| | |
|---|---|
| Øki 3. Børn og ung | kr. 5.200.000,00 |
| Øki 4. Undirvísing | kr. 180.000,00 |
| Øki 5. Mentan og frítíð | kr. 490.000,00 |
| Øki 6. Teknisk mál | kr. 5.580.000,00 |
| Øki 7. Kommunal virki | kr. 4.837.000,00 |
| **Samantals:** | **kr. 16.587.000,00** |

Roknað verður við íløguinntøkum á øki 6 upp á tilsamans kr. 1.400.000,00 útgreinað soleiðis, at kr. 800.000,00 verður mett inntøka av sølu av grundstykkjum, meðan kr. 600.000,00 er meting av sølum av fastognum. Nettoíløgurnar verða sostatt mettar til kr. 15.187.000,00.

Mælt verður býráðnum til at lána kr. 4.000.000,00 til partvísar íløgur.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 44.887.880,00,00 við skattaprosenti 21,5%, skattur av kapitaleftirlønum til kr. 631.000,00, meðan partafelagsskatturin verður mettur til kr. 6.200.000,00. Samlaðu skattainntøkurnar verða sostatt mettar til kr. 51.718.880,00.

Barnafrádrátturin í kommunuskattinum verður hækkaður við kr. 500,00 úr kr. 4.000,00 upp í kr. 4.500,00.

Sum lýst omanfyri verða kr. 1.700.000,00 nýttar av innistandandi pengi til samtykta íløgu í havnabygging, meðan ætlanin er at lána pening til íløgur upp á tilsamans kr. 4.000.000,00, sum er sama upphædd sum sett er av til avdráttir í 2012, soleiðis at talan ikki verður um øking av lánskuld kommununar í 2012.

Uppskotið javnvigar við kr. 72.417.200,00 við einum avlopi upp á kr. 680,00.

Uppskotið hevur verið til 1. viðgerð á býráðsfundi tann 30. september 2010 og varð samtykt at beina tað aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar fyri síðan at leggja uppskot fyri býráðið til 2. viðgerð, sum nú við hesum verður gjørt.

Fíggjarætlanaruppskotið hevur sum nevnt frammanfyri verið til viðgerðar í fíggjarnevndini tann 25. november og verða hervið við tilmæli lagt fyri býráðið tann 01. desember 2011 til viðgerðar og samtyktar.

Fyrisitingin hevur tann 30. november 2011 boðað fíggjarnevndini frá, at ein feilur er íkomin í íløgunum, við tað at kr. 350.000,00 til nýggja vatnleiðing úr Skarðsá ikkin er tikin við tíverri, og tí verður neyðugt at finna fígging til hesa íløgu.

Mælt verður fíggjarnevndini til, at henda íløga verður fíggjað við at hækka skattin av kapitaleftirlønum við kr. 331.000,00 úr kr. 300.000,00 upp í kr. 631.000,00, og at rakstraravlopið verður lækkað við kr. 19.000,00 úr kr. 19.680,00 niður í kr. 680,00. Staðfest er, at kapitaleftirlønirnar fyri 2010 vórðu kr. 647.206,25 móti mettum kr. 300.000,00, meðan avrokningin fyri 2011 ikki verður staðfest fyrr enn fyrst í januar 2012.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 01. desember 2011 og mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá fyrisitingini, soleiðis at omanfyri nevnda íløga verður fíggjað samsvarandi tilmælinum, og at javnvágin á fíggjarætlanini tessvegna verður kr. 72.417.200,00 móti kr. 72.067.200,00.

**Avgerð:**
Uppskot frá borgarstjóranum um at játta íløgu upp á kr. 400.000,00 til keyp av Cobra útgerð til brunaverkið á rakstrarstaði 07.31.11.531.10 konto 325.000, og at henda verður fíggjað við kr. 100.000,00 av meirinntøkum til brunaverkið konto 210001 og kr. 300.000,00 við meirinntøku av partafelagsskatti varð samtykt. (8-0) Blankt atkvøddi Eyðun á Lakjuni.

Samtykt varð einmælt at góðkenna fíggjarætlan kommununar fyri 2012, sum javnvigar við kr. 72.817.200,00.

## Mál nr. 48/2011.

**Mál viðvíkjandi eykajáttan til keyp av bili til teknisku deild, sambært skriv frá teknisku nevndini.**

Soljóðandi skriv dagf.18.10.2011er komið frá teknisku nevnd til fíggjarnevndina:

Ford Transit lastbilurin við krana hevur verið til sýn og krevur nógvar ábøtur, sum vit ikki meta loysir seg at gera, tá bilurin er gamal og gjøgnumgangandi niðurslitin, hann er frá 1999.

Mælt verður tí til, at nýggjur bilur verður keyptur ístaðin og fíggjaður við at flyta kr. 285.000,- frá rakstrarstaði 06.38.11..530.10,- vegir rakstu, konto 160001, til konto 325000 "Flutningsútbúnaður" á rakstrarstaðið 06.38.13.531.20 "rakstrargøgn íløga".

Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi tann 21. oktober 2011.
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku nevnd, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 285.000 til keyp av nýggjum arbeiðsbili til teknisku deildina.
Fíggingin verður fingin til vega við yvirflyting frá rakstrarstaði 06.38.11.530.10 "Vegir rakstur" til rakstrarstað 06.38.13.531.20."Rakstrargøgn Íløga".

Tá talan er um eina eykajáttan, sum hóast alt ikki ber eykaútreiðslur við sær, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17 mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum/fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 27. oktober 2011 og varð samtykt at taka undir við tilmælunum frá teknisku nevndini og fíggjarnevndini, samstundis sum býráðið setur spurnartekin við hvørt ætlaða bilkeypið er tað rætta, og beina eykajáttanina upp á kr. 285.000 til keyp av bili til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundi tann 24. november 2011. Hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.(7-0).

**Avgerð:**
Samtykt varð at góðkenna omanfyri nevndu eykajáttan við 2. og endaligari viðgerð, og at henda verður fráboðað Inneindismálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum sambært § 53, stk. 2 3) í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 við seinnibroytingum um kommunustýri. (9-0).

**<u>Mál nr. 49/2011.</u>**

**Uppskot frá Magnusi S. Midjord.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið uppskot frá Magnusi S. Middjord, býráðslimi, dagfest 24. mars 2011, har hann heitir á borgarstjóran um at seta niðanfyri standandi uppskot á dagskrá til viðgerðir í undirliggjandi nevndum og í býráðnum skjótast gjørligt.

***Talan er um hesi uppskot:***

1. Bygningin kommununar hjá Borg á matr. nr. 671b í Støð 14 í Fuglafirði.
2. Bygning kommununar matr. nr. 296 á Bakkavegi 12 í Fuglafirði, fyrrverandi Breyðmolin og Tip-Top.
3. Bygning kommununar á matr. nr. 280 á Bakkavegi 30 í Fuglairði, fyrrverandi Koksið.
4. Neyst kommununar á matr. nr. 239a í miðbýnum, fyrrverandi ogn hjá Engelbreth og Jens Klæmint Hansen.

**Ad. 1.** Uppskot mítt er, at bygningurin framyvir verður nýttur sum savn fyri ellisakfør, gyrokoptara, gamlar motorar, framsýningar ol., og at møguleiki eisini verður at gera umvælingar av eitt nú ellisakførum í parti av bygninginum. Bygningurin skal verða gjørdur ístand, soleiðis at framsýningarvindeygu verða ísett niðaneftir, somuleiðis sum vindeygu eisini verða á síðuni oman móti bátahylinum.

**Ad. 2.** Bygningurin, sum samtykt er at taka niður, ístaðin verður settur í stand, soleiðis at hesin framyvir skal verða nýttur sum ungdómshús, og at ungdómar eisini verða við til at gera neyðuga arbeiðið við ístandsetan.

**Ad. 3.** Koksið, sum kommunan hevur keypt fyri mongum árum síðan, og sum eingin avgerð er tikin um, hvat gerast skal við, verður sett í stand, soleiðis at bygningurin framyvir kann verða nýttur sum karmur fyri mentan, eitt nú høli hjá listamálarnum og øðrum listafólki við.

**Ad. 4.** Neystið hjá Hans Jacob á Brúnni, sum er ogn kommununar, verður varðveitt og sett í stand, soleiðis at hetta eisini framyvir kann rúma mentan, eitt nú við at ungdómar kunnu fáa undirvísing í, hvussu ein føroyskur bátur verður bygdur og eisini einum sjósavni.

Viðkomandi er altíð fúsur at koma á fund við avvarðandi nevndir um at greiða nærri frá mínum hugskotum.

Eftir at málið varð skrásett hevur borgarstjórin beint málið í mentamálanevndina, havnanevndina og teknisku nevndina til ummæils, áðrenn málið endaliga verður lagt fyri fíggjarnevndina og síðan endaliga fyri býráðið til støðutakan.

Málið varð umrøtt á fundi í mentamálanevndini tann 16. mai 2011, og vórðu fleiri hugskot um frammi, bæði um møguligar umvælingar, niðurtøkur og hvussu eitt nú økið niðanfyri Piddasahandil kundi verið skipað.

Serliga varð Borgbygningurin umrøddur, eitt nú við atliti til møguligt savn fyri ellisakfør, sum víst í uppskoti 1 frá Magnusi Midjord, somuleiðis sum eisini varð komið inn á Koksið, sum mett varð at vera í sera vánaligum standi, og sum kom at kosta væl av peningi at seta í stand, somuleiðis sum eisini varð komið inn á niðurtøku av bygninginum, sum mettur varð at verða til stóran ampa fyri umhvørvið nærindis.

Staðfest varð eisini, at býráðið hevði tikið avgerð um at taka bygningin hjá Breyðmolanum (Tip-Top bygningin) niður, og at fráboðan um hesi viðurskifti varð send Innlendismálaráðnum í sambandi við eykajáttan í sambandi við keypið.

Nevndarlimir vóru á einum máli um, at nú arbeitt verður við møguligari yvirtøku av Mentanarhúsinum, sum kostar kommununi umleið 4,2 mió. kr., so kundu umstøðurnar í sambandi við fleiri onnur kostnaðarmikil mentanarmál ikki verða tikin framum, men at nevndin í núverandi støðu arbeiddi víðari við yvirtøku av Mentanarhúsinum sum 1. raðfestring.

Formaðurin í teknisku nevndini Eyðun á Lakjuni upplýsti, at hann hevði ætlanir um at taka málið um Borgbygningin upp á fundinum í teknisku nevndini, sum ásettur varð at verða hildin 17. mai 2011 kl. 09.00.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum á fundi tann 08. november 2011, og mælir nevndin einmæld býraðnum til, at hildið verður fast við ta fyribils niðurstøðu, sum komið varð til á fundinum, 16. mai 2011.

Henda byggir eitt nú á, at nú arbeitt verður við yvirtøku av Mentanarhúsinum, sum kostar kommununi umleið 4,2 mió. kr., so kundu umstøðurnar í sambandi við fleiri onnur kostnaðarmikil mentanarmál ikki verða tikin framum, men at í núverandi støðu verður arbeitt víðari við yvirtøku av Mentanarhúsinum sum 1. raðfestring.

Haraftrat hevur kommunan staðfest, at sambært frágreiðing frá SP/F Teknistovuni, so verður neyðugt við uppstigan av húsinum fyri umleið kr. 2,3 mió.

Hinvegin verður eisini staðfest, at tað skulu sera stórar upphæddir til at reka Mentanarhúsið, har ein fyribils fíggjarætlan sigur í minsta lagi kr. 1,5 mió árliga, so peningur verður neyvan tøkur komandi mongu árini til bæði ístandsetan og rakstur av fleiri *mentanarbygningum* í býnum.

**Avgerð:**
Samtykt varð, at Tip-top bygningurin og neystið hjá Hans Jacob á Brúnni verða tikin niður, ein meting verður gjørt av hvørjum standi Koksið er í, og at arbeitt verður víðari við at nýta Borgbygningin til savn, soleiðis at hesin verður tillagaður umhvørvinum. (9-0).

**Mál nr. 50/2011.**

**Skriv frá Maluni Kjærbo um ferðslunevndina.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið teldupost frá Maluni Kjærbo, dagfestur 26. september 2011, hvar hon boðar býráðnum frá, at hon av persónligum orsøkum ynskir at taka seg úr ferðslunevndini pr. 01. oktober 2011, har hon eisini hevur verið forkvinna síðan 01. januar 2009.

Avgerð:
Samtykt varð at taka umsóknina til eftirtektar. (9-0). Málið um val av nýggjum nevndarlimi í hennara stað varð útsett og sett á dagskrá til komandi býráðsfund.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.00.

Dánjal Vang

Jann Toftegaard

Elisabeth D. Eidevig

Gudny Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus  S. Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen